# Uppgávur til næmingin




Marjun Syderbø Kjelnæs

Skriva í sandin

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2010

Rannvá Hansen 2023

## Áðrenn tú lesur

Hygg at permuni. Hvør hevur skrivað skaldsøguna?

Hevur tú lisið nakað annað, sum rithøvundurin hevur skrivað? Um ja, hvat?

Hvussu eitur skaldsøgan?

Hvat hugsar tú um, tá ið tú sært heitið á bókini?

Hvat sært tú annars á permuni?



©Nám

## Um rithøvundin

Marjun Syderbø Kjelnæs er fødd í 1974 og uppvaksin í Havn. Hon tók studentsprógv í 1993 og var útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur í 1998. Hon hevur skrivað nógv, bæði yrkingar, stuttsøgur, skaldsøgur og útvarpsleikir. Høvuðsevnið í skaldskapinum snýr seg um tær undranarverdu treytir, vit menniskju liva undir. Tað, sum hugtekur hana mest, er tríeindin: skilið, kenslan og trongdin.

Leita á netinum eftir upplýsingum um ymiskt, sum Marjun S. Kjelnæs hevur skrivað. Nevn okkurt av tí, sum hon hevur givið út.

___

___

___

___

___

___

Marjun S. Kjelnæs er tilnevnd og hevur vunnið nógvar ymiskar virðislønir fyri tað, sum hon hevur skrivað. Leita á netinum og skriva eitt sindur um tað, sum hon hevur vunnið.

___

___

___

Ungdómsskaldsøgan *Skriva í sandin* eftir Marjuna S. Kjelnæs kom út í 2010. Talan er um ein stuttsøguring við tíggju kapittlum, har hvør kapittul er sum ein sjálvstøðug stuttsøga. Skaldssøgan er um 10 ung fólk, gentur og dreingir, sum eru millum 16 og 21 ár, og vit fylgja teimum eitt vikuskifti í Havn. Kapitlarnir hava hvør sín høvuðspersón. Høvuðspersónarnir eru við sum eykapersónar í øðrum kapitlum. Skaldsøgan viðger nógv ymisk evni, m.a. forelskilsi, vinalag, etingarólag, happing, misnýtslu og sambandið millum børn og vaksin.



©Nám

## Meðan tú lesur

## Persónsyvirlit

Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir høvuðspersónarnar í bókini. So hvørt, tú lesur ein kapittul, skalt tú skriva í yvirlitið, hvat samband er millum persónarnar.






©Nám

## Set kapitlarnar á tíðarlinju

So hvørt tú lesur ein kapittul, skalt tú skriva, nær kapittulin byrjar og endar.

| | **kapittulin byrjar** | **kapittulin endar** |
|---|---|---|
| Erla kongsdóttir | | |
| P-bollar og garnatálg | | |
| Fjáltraða frælsið | | |
| Uppiborin | | |
| Halgimenni | | |
| Innan eldin | | |
| Skriva í sandin | | |
| Hitman | | |
| Deyðin og lívið og ... | | |
| Kjólin | | |



©Nám

## Evni í skaldsøguni

Hvør bólkur velur sær eitt evni og skrivar síðutøl og notat, tá ið evnið verður umrøtt í skaldsøguni.

Evni: T.d. forelskilsi, vinalag, etingarólag, happing, misnýtsla og sambandið millum børn og vaksin.

Bólkur 1:

Bólkur 2:



©Nám

Bólkur 3:

Bólkur 4:

Bólkur 5:



©Nám

## Erla kongsdóttir

Lýs Erlu

Greið, við sjónarhorninum hjá Erlu, frá hendingini leygarkvøldið.

Skriva eitt sindur um fuglin erlu kongsdóttir, og hví abbin man nevna Erlu soleiðis.



©Nám

Lýs heimið hjá ommuni og abbanum.

## P-bollar og garnatálg

Lýs Bjørt.

Lýs íbúðina hjá Rana.

Hvat man Rani ætla at spyrja um mitt á síðu 24?



©Nám

Greið frá hendingini á apotekinum.

Hví eitur kapittulin soleiðis?

## Fjáltraða frælsið

Lýs Rana.



©Nám

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Rana.

Greið frá tí, sum vit lesa um rúsevni.

Greið frá hendingini millum Rana og Ingunn.

Hvat merkir yvirskriftin, og hvat sipar hon til?



©Nám

## Uppiborin

Lýs Ingunn.

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Ingunn.

Hvussu verður líknilsið um miskunsama samáriubúgvan/samverjan (Luk. 10, 30-37) brúkt í tekstinum?



©Nám

Lýs Anitu og greið frá brævinum.

Á s. 47 fáa vit eina ábending um, nær søgan gongur fyri seg. Nær? Grundgev.

## Halgimenni

Lýs Rebekku.

Hvat nevnir Rebekka um hjartavinkonur, og hví man hon ikki hava nakra hjartavinkonu?



©Nám

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Rebekku.

Skriva eitt sindur um sjúkuna og tankaverðina hjá Rebekka. Fáa vit nakra ábending um, hví tað man vera soleiðis?

Greið frá onkrum av tí, sum hendir í ballinum.



©Nám

## Innan eldin

Lýs Tóka.

Hvussu er sambandið millum Tóka og Rebekku, og hvat hugsar Tóki um Rebekku?

Hvussu er sambandið millum Tóka og Jann? Hvørjir munir eru millum teir, og hví fylgjast teir?



©Nám

Hvat hendi millum Tóka og Áslu? Hví, heldur tú, hetta hendi, og hvat heldur Tóki um tað, sum hendi?

Hvat er tað at vera “old school” kristin? Og hvat er tað at vera “new school” kristin?

## Skriva í sandin

Lýs Súna.



©Nám

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Súna.

Greið frá hendingini á Hvonn.

Hvat er tað, sum Súni skal gloyma? (s. 92)

Finn og fortel bíbliusøguna um Jesus, sum skrivaði í sandin.



©Nám

Hví eitur kapittulin “Skriva í sandin”?

## Hitman

Lýs Jann.

Leita á netinum og skriva eitt sindur um Hitman, Dianu Burnwood og Agent 47.



©Nám

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Jann.

Hvat heldur Jann um Trónd? Hvat heldur Jann um Tóka?

Hvussu er sambandið millum Jann og Trónd, og hví blívur Jann so illur við Trónd?



©Nám

Hvat heldur tú um Trónd?

## Deyðin og lívið og úlvurin og bjørnin og fuglarnir

Lýs Trónd.

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Tróndi.



©Nám

Skriva eitt sindur um “drongin í horninum”.

Hví eitur kapittulin “Deyðin og lívið og úlvurin og bjørnin og fuglarnir”?

Hví vil Tróndur hava Jann aftan á sær?



©Nám

**Kjólin**

Lýs Áslu.

Skriva eitt sindur um familjuna hjá Áslu.

Lýs vinalagið millum Áslu og Rebekku.



©Nám

Les brotini um kjólan niðast á s. 126 og mitt á s. 146. Samanber brotini og lýs munin.

Hvat merkir: “Non! Rien de rien. Non! Je ne regrette rien.”?

Hví man bókin enda við hesum orðum?



©Nám

## Tá ið tú hevur lisið

Skriva eitt sindur um, hvar søgan fer fram.

Hvussu er málið og skrivingarlagið í skaldsøguni?

Hví heldur tú, at Marjun S. Kjelnæs hevur skrivað hesa skaldsøguna?



©Nám

Hvør er boðskapurin?

Dámar tær skaldsøguna? Hví / hví ikki?

Evni í skaldsøguni

Sitið saman í bólkum og skrivið um evnið, sum tit hava tikið notat og skrivað síðutøl til.



©Nám

Vel tann kapittulin, sum tær dámar best. Sig heilt stutt, hvat hann er um, og greið bólkinum frá, hví tær dámar júst hann best.



©Nám